# Leiðreglur fyri loyvi til uttandura tiltøk í miðbýnum

Fylgjandi øki í miðbýnum kunnu nýtast til tiltøk:

- Skálatrøð
- Vágsbotnur og Trappan í Vágsbotni
- Undir Bryggjubakka
- Tórsgøta niðan til Sverrisgøtu
- Niels Finsens gøta frá Vaglinum niðan til Sverrisgøtu og parkeringsøkið við ráðhúsið
- Grasagarður

Møguleiki er eisini at søkja um loyvi at nýta onnur kommunal øki í miðbýnum. Loyvið er tá treytað av, at kommunan metir, at økið er egnað til endamálið.

## Umsóknin

Tá ið søkt verður um loyvi at brúka eitt øki, skulu í minsta lagi hesar upplýsingar latast inn saman við umsóknini:

- Navn, bústaður og kontaktupplýsingar hjá ábyrgdarhavandi persóni
- Hvat ætlanin er at skipa fyri
- Hvar ætlanin er at hava tiltakið
- Nær økið skal brúkast (dagar og klokkutíðir)
- Er neyðugt at brúka vegir ella parkeringspláss, so skal upplýsast, nær ætlanin er at steingja fyri ferðsluni og lata upp aftur
- Hvussu nógv fólk, fyriskipararnir vænta til tiltakið

Umsóknin skal vera kommununi í hendi í minsta lagi fýra vikur, áðrenn tiltakið byrjar. Er talan um størri tiltak, ið krevur trygdarætlan og góðkenning frá løgregluni, skal umsóknin vera kommununi í hendi í minsta lagi seks mánaðar, áðrenn tiltakið byrjar. Nærri kunning um hetta sæst á heimasíðuni hjá løgregluni, www.politi.fo

Snarskivan samskipar innkomnar umsóknir til viðgerð og støðutakan.

## Trygd

Tá ið talan er um størri tiltøk, sum krevja váðameting, trygdarætlan v.m. umframt endaligt loyvi frá løgregluni, verður umsóknin send kommunala tilbúgvingarmyndugleikanum, t.e. Tórshavnar Sløkkiliði, til støðutakan, áðrenn umsóknin verður løgd fyri stjórnina.

## Treytir

Veitir kommunan loyvi, er tað altíð við fylgjandi treytum:

- Talan skal vera um tiltak, sum er alment
- Er talan um handilsligt tiltak, skal Tórshavnar kommuna ongar útreiðslur bera av tiltakinum. Tað eru til dømis tiltøk, har søla fer fram, tiltøk har talan er um marknaðarføring av vørum ella tænastum og tiltøk, sum atgongumerki verða seld til. Kommunan letur tí bara loyvi tíl tílík tiltøk, um fyriskiparar góðtaka at rinda frammanundan fyri tænastur, ið kommunan má veita
    - Tænastur frá kommununi er til dømis: Upprudding og feiubil, skelting, flagging, skrellispannir, kunngerðir um ferðslu, atgongd til streym og vatn, flyting av urtapottum v. m. Høvuðsreglan er tó, at kommunan ikki selur tænastur, sum kunnu keypast frá privatum veitarum – til dømis vesi til tónleikatiltøk og festivalar

- Fyriskiparar átaka sær allar útreiðslur, verður mál um endurgjald reist orsakað av tiltakinum
- Er talan um almannagagnlig og alment upplýsandi tiltøk, so sum tiltøk fyri heilsu, trivnað og náttúru og umhvørvi, kann kommunan velja at stuðla við at lata tænasturnar nevndar omanfyri
- Tá ið neyðugt er at skelta fyri at steingja veg og parkeringspláss, er tað altíð kommunan, ið tekur sær av uppgávuni, óansæð hvør rindar

## Gjald fyri tænastur

Tá fyriskiparar ynskja tænastur frá kommununi í sambandi við tiltøk, og rindast skal fyri hetta, verður fyriskipari settur í samband við ábyrgdarhavandi í kommununi, ið veitir hesar tænastur.

Ábyrgdarhavandi skal tryggja, at:

- Skrivlig avtala verður gjørd um tænasturnar
- Gjaldið er greitt og avspeglar útreiðslurnar hjá kommununi
- Rokning verður send
- Gjaldið er goldið, áðrenn tænastan verður veitt

Rindar fyriskipari ikki fyri tænastu frá kommununi, verður ikki givið loyvi til tiltøk, ið viðkomandi er við til at fyriskipa restina av árinum og næsta álmanakkaár.

## Størri tiltøk

Ongi stór tiltøk verða loyvd í miðbýnum um somu tíð sum Umhvørvisvika, Mentanarnátt, Tórshavnar Marathon, Faroe Pride og ólavsøka er. Somuleiðis verður ikki givið loyvi til størri tiltøk, tá ið siðbundin tiltøk eru, so sum grækarismessa, flaggdagur og 1. maidagshald.

Størri tónleikatiltøk, so sum konsertir og festivalar í miðbýnum, kunnu bert vera leygardagar. Tey kunnu byrja og enda hesar klokkutíðir:

- Klokkan 15 til 3

Tað verður í mesta lagi givið loyvi til eitt størri tónleikatiltak í miðbýnum um mánaðin.

Ynskja fyriskiparar at skipa fyri størri tónleikatiltøkum á øðrum økjum í býnum, verður mett í hvørjum einstøkum føri, um omanfyri nevndu tíðir kunnu broytast, um ynski er um tað.

## Tal av tiltøkum

Tiltøk í miðbýnum skapa trivnað og lív í miðbýnum, men av tí, at tað í flestu førum er neyðugt at steingja fyri ferðslu ella parkeringsmøguleikum, meðan tiltøk fara fram, kunnu tiltøk eisini hava eina neiliga ávirkan á vinnulív og gerandisdagin hjá teimum, ið virka og búgva í miðbýnum.

Tá støða skal takast til, um eitt tiltak kann fáa loyvi í miðbýnum, verða tí hesar leiðreglur galdandi:

- Tað verður givið loyvi til eitt stórt tónleikatiltak í miðbýnum um mánaðin
- Tað verða givin tvey loyvi til tiltøk í Tórsgøtu um mánaðin
- Tað verða givin tvey loyvi um mánaðin til tiltøk Undir Bryggjubakka, í Vágsbotni og á Trappuni, sum krevja, at vegurin verður stongdur fyri ferðslu
- Tað verða givin loyvi til fýra tiltøk um mánaðin í Grasagarði og í Niels Finsens gøtu frá Vaglinum og niðan til Sverrisgøtu

*Soleiðis samtykt í mentamálanevndini tann 4. juni 2025.*